# Dr. Jakobsensgøta verður gongugøta

**Tórshavnar Kommuna hevur samtykt at gera serliga byggisamtykti fyri økið kring Dr. Jakobsensgøtu og Sverrisgøtu til tess at økja um tættleikan kring gøtuna. Endamálið er at víðka gongugøtuna út móti gamla kirkjugarði á Svínaryggi**

ÍBÚÐIR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Fyrsta stigið er tikið til tess at sambanda gongugøtuna í Niels Finsensgøtu og nýggju handils- og gongugøtuna Sverrisgøtu/Dr. Jakobsensgøtu. Býráðið í Havn hevur eisini samtykt at broyta byggisamtyktina fyri økið, so byggjast kann tættari og hægri fram við gøtuni*
*Mynd: Jonhard Hammer*

Dr. Jakobsensgøta og Sverrisgøta í Havn í skulu í framtíðini verða handils- og gongugøtu.

Tórshavnar Býráð samtykti hóskvøldið at gera eina serstaka byggisamtykt fyri Sverrisgøtu/Dr. Jakobsensensgøtu í Havn. Byggisamtyktin skal fevna um tey matrikulnummur, sum marka upp at gøtuni, og er endamálið at økja um tættleikin kring gøtuna.

Í samtyktini hjá Tórshavnar Býráð stendur, at økið, sum ætlanin fevnir um, skal síggjast sum ein týðandi partur av miðbýarætlanini, har ein nýggj handilsgøta/gongugøta skal virka sum bindingslið millum verandi og komandi býarfunktiónir.

– Ein slík gøta fer at verða eitt nátúrligt bindingslið millum tvær pontentiellar miðbýarlundir við gamla kirkjugarð og verkæltanina um eina miðbýarlund við tinghúsvegin millum Bøkjarabrekku og Áarvegin, stendur í samtyktini.

Býráðið hevur fyrr arbeitt við eini líknandi ætlan, men tann ætlanin varð ikki førd út í verkið, m. a. tí at loysn ikki varð fingin á parkeringsviðurskiftini.

– Í dag hevur Tórshavnar kommuna lagt eitt ávíst arbeiði í at útvega fleiri parkeringspláss kring miðbýin, og er tað tískil upp á sítt pláss at henda ætlanin verður tikin framaftur, nú vísast kann á fleiri parkeringspláss í nærøkinum, heldur býráðið.

Heildarætlanin leggur tó upp til, at beinleiðis krav til bilstøðlar á sjálvum matriklinum hjá teimum, har meirbygging verður loyvd, ikki skal setast _ hetta fyri at ætlanin um eina slíka handilsgøtu/gongugøtu skal kunna fremjast.

Heildarætlanin ásetir, at handlar skulu vera í hæddini við atgongd til gøtuna. Hinar hæddirnar kunnu verða til skrivstovur, smærri virki, sum nátúrliga hoyra heima í sambandi við eina handilsgøtu/gongugøtu, stovnar og íbúðir.

Býráðið samtykti uttan atkvøðugreiðslu málið á fundi hósdagin, og loyvir heildarætlanin matriklunum, ið marka upp til Dr. Jakobsensgøtu og Sverrisgøtu eitt byggistig upp á 0,8 og eitt nettonýtslustig upp á 2,0.

Fyrsta stigið til at gera Sverrisgøtu og Dr. Jakobsensgøtu til gongugøtu er tikið. Seinastu vikuna hevur Tórsgøta verið stongd fyri allari ferðslu, tí vegmótið Tórsgøta/Sverrisgøta verður steinsett - bæði fyri at markera, at fólk gongur tvørtur um vegi, og fyri at minka um ferðina hjá bilunum. Hetta arbeiðið verður liðugt hesa vikuna.

Almanna- og Heilsumálaráðið:

# Skal gera 105 parkeringspláss

ÍBÚÐIR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Almanna- og heilsumálaráðið má gera parkeringspláss til 105 bilar, áðrenn hesir tríggir íbúðarbygningarnir verða seldi*
*Mynd: Jonhard Hammer*

Almanna- og Heilsumálaráðið skal í minsta lagi gera 105 parkeringspláss við teir tríggjar íbúðarbygningarnar á sjúkrahúsøkinum, áðrenn teir kunnu seljast.

Tórshavnar Býráð samtykti í hóskvøldið endaliga treytirnar fyri, at teir tríggir íbúðarbygningarnir á sjúkrahúsøkinum í Havn kunnu seljast.

- Av tí at trýstið er so stórt á økið, so vilja vit treyta okkum, at neyðug parkeringspláss eru til íbúðirnar, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Býráðið hevur tí gjørt av, at serstak byggisamtykt skal gerast fyri økið skal gerast fyri økið, og at tað verður tinglýst, at treytin viðvíkjandi parkeringsplássum verður fylgd.p

